**Hilmar:**

# Á fiskiveiðu undir Grønlandi

**Í 1952 greiddi Hilmar frá túrinum við Grønlandsfarinum í danska deyvablaðnum Effata. Sum tað sæst dugur hann væl at greiða frá**

Í mai fekk eg hýru við skonnartini Grønlandsfarið, sum er 321 tons til støddar. Mítt útstýr fylti tveir koyggjusekkir. Eg skuldi vera burtur í fýra mánaðir og mátti tí hava nógv klæði við. Vit vóru 35 mans við.

Tey vóru nógv, sum stóðu á kajunu og veitraðu, tá ið vit fóru avstað. Vit skuldu fyrst til Havnar at taka proviant og olju. Í Havn varð øll manningini kannað fyri tuberklar og kynssjúkur. Tann fyrra kanningin var at fyribirgja smittu umborð. Tann seinna var fyri at forða fyri, at vit førdu smittuna við til Grønlands. Teir, sum ikki stóðu hesa kanning, sluppu ikki við.

## Túrurin byrjar

Tá ið vit høvdu mynstrað, fóru vit avstað. Samdøgrið var býtt upp í fimm vaktir: Hundavaktin kl. 0-4, morgunvaktin, kl. 4-7, fyrrapartsvaktin kl. 7-12, seinnapartsvaktin kl. 12-18 og kvøldvaktin kl. 18-24.

Teir, sum høvdu vakt, skuldu millum annað ganga róðurtørn. Skipari og stýrimaður navigeraðu og settu kósina, og teir tveir motorpassararnir passaðu og smurdu motorin.

Meðan vit sigldu tvørtur um Atlantshavið, riggaðu vit reiðskapin til. Fleiri túsund húkar við teymum skuldu knýtast í línuna.

Kokkurin hevði nóg mikið at gera við matgerð. Hann bakaði eisini rugbreyð og siktibreyð. Hvønn sunnudag bakaði hann eisini eitt sindur av køku til okkara.

## Eitt rættuligt ódnarveður

At byrja við høvdu vit gott veður hvønn dag. Men táið vit sigldu tvørtur um Danmarkarstrætið millum Ísland og Grønland gjørdist illveður, og sjógvur skolaði inn á dekkið. Knappliga reistist ein sjógvur fimm metur yvir skipið og breyt inn á dekkið. Hetta var so ógvusligt, at tað kendist sum ein bilsamanstoytur. Skipið fekk stóra slagsíðu. Eg datt í egningarskúrinum, har eg gjørdi línu til, men reisti meg skjótt aftur. Tá sá eg gjøgnum hurðaropið í egningarskúrinum bakborðslúnningina liggja undir í sjógvi, meðan stýriborðslúnningin stóð tilsvarandi høgt uppi. Tíbetur reisti skipið seg upp aftur. Sjógvurin hevði brotið skylettið, og nú rann sjógvur niður í kahúttina. Hann rann millum annað niður á radio hjá skiparanum, so tað ikki kundi brúkast.

Sjógvurin rann eisini niður í mína koyggju, so alt í henni gjørdist rennvátt. Tað var verri hjá mær enn hjá hinum, tí eg hevði yvirkoyggju. Kokkurin, sum stóð og kokkaðist beint tá, fekk eisini karm.

Dekshúsið varð knúst, og ein bátur sum stóð á dekkinum fekk eisini skaða. Skiparin mátti taka radio sundur og heingja tað at turka yvit kabússini.

Sjálvur mátti eg sova í eini aðrari koyggju, til mín egna var turr aftur. Men fyrst mátti eg vaska saltrákan burtur við vatni og sápu.

Stormurin vardi í trý samdøgur, til vit komu inn í Davidsstrætið vestan fyri Grønland.

## Ísfjøll

Vit máttu sigla sera varisliga í Davidsstrætinum, tí her var nógv av ísfjøllum. Her var neyðugt at hava mann frammi á bógnum alla tíðina at halda útkikk.Tað kundi vera vandamikið at renna á eitt ísfjall.

So gjørdist toka, og nú máttu tveir menn halda útkikk, og vit máttu eisini nýta sirenu, so onnur skip kundu hoyra okkum.

Tað eru fiskiskip frá nógvum londum í Davidsstrætinum. Vit sigldu framvið einum portugisiskum fiskiskipi. Tað er stórur munur á portugisiskum, fronskum, føroyskum og donskum fiskiskipum og á háttin teir fiska.

## Føroyingahavnin

Tað tók 11 dagar at sigla úr Føroyum í Føroyingahavnina. Tað er trupult at sigla inn hagar, tí tað eru so nógv sker. Nakrir føroyskir bátar hava rent á flúrar og eru soknir. Men tibetur er manningin altíð bjargað.

Vit komu væl gjøgnim skergarðin og kastaðu akker. Síðan vóru okkara tveir bátar settir út. Í Føroyingahavnini høvdu vit havt tveir aðrar bátar standandi yvir veturin. Teir skuldu nú málast og riggast til fiskarí. Tveir dagar seinni vóru teir klárir, og vit kundi fara til útróðrar við okkara fýra bátum.

Eg var ein túr nakað inni í landinum. Eg helt ikki Grønland vera vakurt. Her var nærum bert grót og skursl. Men onkunstaðni vuksu svørt ber, sum smakkaðu avbera væl.

Í juni og juli er dagsljós alt samdøgrið. Í august er náttarmyrkiur 1-3 tímar, og í september byrja langar og myrkar nætur.

## Fiskaríið

Vit fiskaðu undir Grønlandi í fýra mánaðir frá juni til fyrst í september. Manningin er býtt upp í fýra lið, eitt til hvønn av bátunum. Vit fiskaðu við línu og vóru úti einar 12 tímar í senn. Vit settu um 5.000 húkar hvørja ferð. Arbeiðsdagurin var 18 tímar. Tískil fingu vit bert 6 tímar frívakt um samdøgrið hesar fýra mánaðirnar, sum vit fiskaðu. Men sunnudag høvdu vit frí og kundu sova leingi. Sunnukvøld varð byrjað aftur.

Í ljósu summartíðini kundi fiskast allar 24 tímarnar í samdøgrinum. Tríggir menn vóru við hvørjum báti. Teir kundu so koma at borði við 1.200 toskum, og tað kundu so gerast 4.800 fyri allar fýra bátar.

So skjótt bátarnir vóru tømdir, fóru teir avstað aftur við nýggjari manning. Veiðan fyri eitt samdøgur kundi tí gerast 9.600 toskar.

Helvtin av manningini er umborð í Grønlandsfarinum eina viku í senn at reinsa fiskin og at salta hann í lastini. Hvønn sunnudag verður so skift, so teir sum høvdu verið umborð, nú fóru í bátarnar.

Seinni fiskaðu vit við Frederikshåb ísblinkin. Her kemur innlandsísurin heilt út til sjóvarmálan.

Tað er næstan altíð spegilsblankur sjógvur í Davidsstrætinum, men knappliga kundi koma stormur. Tá máttu vit draga akkerið inn og fara inn í skergarðin at fiska.

Nakrar ferðir sigldu vit á eitt sker. Men vit vóru hepnir og fingu ongan skaða.

## Heimferðin

Seinast í september góvust vit at fiska. Vit fóru aftur í Føroyingahavnina. Her settu vit teir tríggjar bátarnar í land. Hesir skuldu standa her til komandi vár. Vit tóku vatn og olju, og dagin eftir fóru vit at sigla heim. Tá ið vit fóru út úr Føroyingahavnini stóðu grønlendingar og veittraðu farvæl til okkum.

Tá ið vit fóru framvið Kap Farvel, vóru aldurnar so stórar sum 2 og 3-hæddað hús. Skipið gleið seigliga niður í aldudalin og upp aftur á aldutoppin. Hvíta skúmið frá aldunum kom inn á dekkið. Skipið var jú tungt lastað.

Hetta illveðrið vardi í tvey samdøgur. Seinni hoyrdu vit í radio, at ein norskur fiskibátur var burturgingin, men manningin var tíbetur bjargað av einum grønlendskum skipi.

Ferðin heim tók 17 dagar, og alla tíðina var ringt veður. Tá ið vit lógu í koyggjuni, var tað eins og tá mamma okkara vaggaði okkum í vøggu sum børn.

Endiliga komu vit móti landi í Føroyum. So skjótt vit høvdu lagt at kei komu konur, gentur, børn og eisini nakrir menn leypandi umborð at heilsa teirra næstringum, sum tey ikki høvdu sæð í fýra mánaðir.

Eina viku seinni var øll lastin landað og komin inn í pakkhúsið, har fiskurin var vrakaður, vigaður og pakkaður í ballir. Fiskurin varð seinni fluttur við damparum til Suðureuropa og Brasilia, har hann var seldur.

Aftaná jól fingu vit avrokning fyri túrin.



*Grønlandsfarið, sum Hilmar var við*



*Teir flekja umborð á Grønlandsfarinum. Hilmar stendur við flekiborðið mitt á myndini*

***Komandi partur***

*Komandi partur er ein frásøgn í samband við, at tað eru liðin 200 ár síðan skalvalopið, sum førdi til avtoftingina av Blankaskála*

Sosialurin